# Ein danskttími í bygdini H

**Tá ein hevur danskt í skúlanum í Haraldsundi, so verður eisini tosað danskt. Øll hava danskt samstundis og øll fáa undirvísing á tí støðinum, tey eru á.**

BYGDARSKÚLI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður Lydersen*



**Haraldsund:** - Ja, Karola. Vil du venligst læse på side femoghalvtreds!

Tað er danskt á skránni í skúlanum á Haraldsundi fyrrapartin henda kalda hósdagin í apríl.

Teir sjey næmingarnir hava allir tikið bøkur sínar fram. Og sum orðatakið sigur: "Tá næmingurin er klárur, er lærarin klárur". Nú kann undirvísingin byrja.

Lærarin Magna Thomassen stendur har frammi við pultin, og frammanfyri sær hevur hon allan skúlaungdómin í Haraldsundi.

Skúlin heldur til í einum húsum, sum minna meiri um eini sethús enn um ein skúla. Hóast bygningurin er gamal, so er hann innrættaður og útgjørdur við øllum tí, sum hoyrir til ein slíkan skúla.

Har er tó bert eitt stórt flokshøli. Og har savnast allir næmingarnir til allar tímarnar saman við einasta læraranum við skúlan.

## Størsti skúlagarðurin

Klokkan er júst farin av 10, og tað er fríkorter. Næmingarnir eru allir farnir út um at spæla eina løtu.

At tað er kalt í veðrinum henda dagin, sær ikki út til at nerva teir eitt einasta petti. Tey eru øll væl ílatin til føroyska veðurlagið.

Uttanfyri er helst minsti skúlagarðurin í Føroyum – bert ein trappa og so ein lítil vegur niðan frá parkeringsøkinum.

Ella kanska er hetta størsti skúlagarðurin í heiminum, tí her er einki, ið avmarkar garðin. Einki hegn og einki portur. Og tí røkkur skúlagarðurin í roynd og veru um alla oynna, um ein velur at



*Tey spæla eitthvørt spæl á trappuni – upp og niður, niður og upp – í Føroya størsta skúlagarði*

## Útferðir

Fyri tveimum árum síðani vóru næmingarnir og lærarin á eini ferð í Danmark. Tey høvdu sjálvi savnað inn allan peningin til hesa ferðina, sum tey vóru sera fegin um.

Í ár verður ikki farið so langt. Tey ætla sær ein túr í Fugloynna, har tey skulu gista eina nátt og eisini ganga millum báðar bygdirnar.

Tey ætla sær somuleiðis at fara ein dagstúr í Svínoynna í summar.



*Magna Thomassen hevur verið einalærari í Haraldsundi í seks ár. – Her er gott at vera. Men tað hevur sínar avbjóðingar við sær, sigur hon*